Summar PRÁT



# POLITIKARAR SKULDU GINGIÐ MEIRA TIL SJÓNLEIK

– SJÓNLEIKUR SKAL **ENDURSPEGLA SAMFELAGIÐ**, OG ONGI EVNIR MUGU TIGAST BURTUR Á PALLI, BARA TÍ NAKRIR POLITIKARAR VILJA TAÐ, TÍ **VERULEIKIN** ER, AT LÍVIÐ ER IKKI BARA RÓSUREYTT, MEN EISINI LJÓTT OG SKITIÐ, SIGUR **LAURA JOENSEN**, SJÓNLEIKARI OG BÓNDAKONA Í **SKÁLAVÍK**. HON HARMAST UM MATERIELLA OYÐSLIÐ Í SAMFELAGNUM OG FEGNAST UM **VIRKNA LÍVIÐ** Á GARÐINUM Í SKÁLAVÍK, HAR HON OG MAÐURIN HAVA OVMIKIÐ AT TRÍVA Í ALT ÁRIÐ. **EYDNAN** ER AT LIVA Í **FRIÐI**, **SEMJU** OG **NØGDSEMI**, HELDUR HON



**SAMRØÐA**
Uni Arge

Hon hevur verið virkin sjónleikari í nærum 50 ár, og hóast hon er havnarkona um ein háls, hevur hon bóndast í Skálavík, síðan hon fyri 28 árum síðan møtti manninum, Pálli í Dalsgarði. Á ólavsøku helt Laura Joensen í sambandi við ólavsøkusangin undir tinghúsinum røðu um tjóðarhátíðina og landsins støðu. Onkur helt, at hon var bersøgin, meðan onnur hildu, at hon segði mangt, ið neyðugt var at siga. Vit hava órógvað bóndakonuna í Skálavík við nøkrum útdýpandi spurningum til Summarprátið.

**Tú nevndi í røðuni á Vaglinum dansin um gullkálvin. Hvussu fer hann fram í dag?**

Tað er bara at hyggja rundan um okkum. Hygg at húsunum, ið verða bygd. Tey eru sum slott. Sjálvandi skulu fólk byggja sær hús, men tey nýtast ikki at vera størri og flottari enn tey hjá grannanum. Far niðan á Sandvíkahjalla og síggj, hvat fólk blaka burtur. Alt gott um Endurnýtsluna, men nógv gott tilfar fer bara upp í bláa luft. Eg hugsi eisini um tað materiella skramblið, ið verður innflutt, sum vit so senda til onkra neyðhjálp, tá vit eru troytt av tí. Mentanin at brúka og blaka burtur er øgilig. Hvat er meiningin við at keypa útlendskar bankar? Hava vit onki lært av Íslandi? Bankastjórarnir eru um at hoykna undir egnum lønum, meðan vit vanligu brúkarar skulu gjalda fyri hvørja einastu lítlu tænastu, so tú næstan ført hall av at hava nøkur oyru standandi í bankanum, tí rentan er so lág. Summi skúma róman, meðan onnur sita eftir við sviðusoð.

**Í røðuni nevndi tú, at øll fáa ikki lut í samfelagsins ríkidømi. Hvat meinar tú tá við?**

Tá ið sparast skal, eru tað sum oftast tey lægst løntu, ið skulu spenna beltini inn, tí annars eru vit ikki kappingarfør í prísi. Men hvar ber til at spara hjá teimum, ið arbeiða á flakavirkjum, sjúkrahúsum, í skúlum, almannaverkinum, á eldraøkinum og mentanarøkinum? Hesi økir eru øll neyðug í samfelaganum, og vit fáa øll ágóðan av teimum. Ein partur av fólkinum hevur møguleika at keypa seg til okkurt eyka, men størsti parturin hevur ikki, og tey, ið arbeiða innan hesi økini, eru tey, ið lønarliga eru lítið vird. Her má meira samhaldsfesti til. Skrivað stendur, at tann, ið hevur, skal fáa, men tað má vera so, at tann, ið hevur, má lata. Tað ber ikki til at knokkroyta skallut. At øll, ið arbeiða innan hesi økini, gera eitt ovurstórt arbeiði hóast vánalig kor, má ikki gerast ein sovipúta hjá politikarunum.

**Tú ert sjónleikari og vil hava betri umstøður til Tjóðpallin. Hvønn týdning hevur sjónleikur fyri samfelagið?**

Sjónleikur er tann listin fram um aðrar, ið endurspeglar veruleikan, og tí hevur hann stóran týdning. Veruleikin er ikki so rósureyður, sum vit kanska hava lyndi til at halda, og sum summir politikarar vilja hava okkum at halda. Lívið í øllum sínum fjølbroytni er eisini ljótt og skitið, og tað eigur sjónleikurin eisini at vísa á. Ávísir politikarar áttu at gingið nógv meira til sjónleik. Teir høvdu kanska lært okkurt av tí. Tjóðpallur Føroya eigur at gerast okkara flaggskip innan sjónleikin, og tí skal hann hava betri umstøður. Eisini eiga politikararnir at taka ábyrgdina av, at vit fáa ein vælvirkandi Tjóðpall. Teir hava samtykt, at vit skulu hava hann, so vónandi lata teir hann ikki verða húkandi á knøunum alt ov leingi. Gabriel Garcia Lorca segði, at hjá tí tjóð, ið ikki stuðlar leiklistini, stendur deyðin í durinum.

**Skal sjónleikur provokera ráðandi fatanir, vísa á skeivleikar í samfelagnum ella kanska bara fáa fólk at flenna?**

Sjálvandi skal hann provokera ráðandi fatanir og fyri tann skuld allar aðrar fatanir. Tá tú vísir á skeivleikarnar, er spegilin klárastur. Tað ber ikki til at káma spegilin við at nokta at tosa um summi evnir, tí onkur politikari krevur tað. Tað er at renna undan ábyrgd og ikki síggja veruleikan í eyguni. Sjálvandi skulu látur og undirhald eisini vera í leikhúsinum. Dario Fo segði, at tá tú letur munnin upp og flennur, fær vitið møguleika at fara inn. Tí er satiran, tá hon er best, so týdningarmikil.

**Hvørjar hava verið tínar størstu upplivingar í sjónleikinum?**

At standa á palli í Sjónleikarhúsinum fyrstu ferð sum 15-16 ára gomul var stórt. Sekstiárini í Sjónleikarhúsinum vóru ein stórtíð hjá sjónleikinum í Føroyum. Eyðun Johannessen, fyrsti útbúni sjónleikarin, kom heim og legði grundina undir nýmótans sjónleikin. Longu tá vóru ætlanir frammi um tjóðpall og at útbúgva sjónleikarar. Í 1977 varð Gríma stovnað. Tá búði eg í Danmark, men kom so heim tvey ár seinni og havi verið við síðan. Av stórum upplivingum og avbjóðingum fyri meg persónliga kann eg nevna einrøðuleikirnar "Kærleiksøga Aldarinnar," "Logi, logi eldur mín" og "Shirley Valentine." Tann størsta upplivingin, tú sum sjónleikari kanst fáa, er, tá alt gongur upp í eina hægri eind, og tú kennir, at tú hevur áskoðaran við tær. Eisini hevur tað verið stórt, at eg tvær ferðir havi fingið størsta heiður, tú kanst fáa fyri mentanarlig avrik her á landi, M.A. Jacobsens virðislønina og Mentanargávu Landsins. Hetta vóru viðurkenningar, sum fingu meg at trúgva, at alt hevur ikki verið til fánýtis. At verða biðin at halda røðu á Tinghúsvøllinum ólavsøkudag var eisini eitt hæddarpunkt í mínum lívi.

**Tú bóndast í Skálavík saman við manninum. Akkurát hvat fáast tit við?**

Spyr heldur, hvat vit ikki fáast við. Í dag havi eg hongt upp á eitt turkilag og kókað rabarbusúltutoy, og í kvøld skal